## Økt virksemi á keiini birtir vón

**Vágur:** Svenning Borg, formaður í Havnanevndini hjá Vágs kommunu, hevur góðar vónir til framtíðina, nú økt virksemi er á keiini í Vági.

Svenning Borg upplýsir fyri Suðurrás, at gongd er komið á aftur Polarfrost og eisini á saltfiskavirkinum Løðhamar. Í farnu viku vóru sostatt eini 100 fólk til arbeiðis á keiini í Vági.

Tá farmaskipið Norland seint mikukvøldið í farnu viku á fyrsta sinni kom á Vág, skipaði Havnanevndin saman við Vágs Havn fyri einari lítlari móttøku, har Norland varð ynskt góðan byrð, og vón var til eitt gott samstarv í framtíðini.

Á móttøkuni gav Havnanevndin og Vágs Havn eina gávu til Norland - eina mynd av Vágsfjørði, tikin av Moyggjartúgvu.

Umframt at farmaskip nú aftur fer at sigla regluliga á Vág, hava russisk skip eisini verið fastir gestir við djúphavnina í Vági seinastu vikurnar. Higartil hava millum 5 og 10 russisk skip verið á Vági.

- Útlitini eru góð, fyri at hetta fer at halda áfram, metir Svenning Borg, formaður í Havnanevndini.
sb.

## Útróðrarmenn betri umstøður

**Strendur:** Um ikki so langa tíð fáa útróðrarmenn á Strondum munandi betri umstøður enn áður.

Higartil hava teir havt útgerð sína goymda í bingjum og á øðrum støðum, men nú hevur kommunan latið byggja ein bygning, har íalt níggju skúrar eru, og sum útróðrarmenn nú kunnu leiga fyri ein ávísan kostnað.

Við hesi loysnini vónar kommunan at viðurskiftini hjá útróðrarmonnum verða meiri skipað. Og líkt er somuleiðis til, at útróðrarmenninir hava tikið væl ímóti hesi ætlanini, sum nú gevur teimum munandi betri karmar at arbeiða undir.

**sb.**

## Stórur áhugi fyri ættargransking

ÆTTARGRANSKING
*Tíðindaskriv*

Ættargranskingarfelagið KT Slekt hevur havt aðalfund. Nú er nevndin mannað soleiðis: Göran Wennerström er formaður, Hans Suni Jensen er næstformaður, Sofus Johannesen er kassameistari, Randi Á Jakobsen er skrivari og Steinbjørn í Dali er netvørur.

Nú eru um 450 limir skrásettir í felagnum, harav gott 200 er aktivir. Limatalið veksur støðugt og seinasta árið eru um 100 lagstir afturat.

Farna árið hevur gingið væl við teimum báðu stóru verkætlanum, sum felagið arbeiðir við. Onnur er at fáa allar fólkateljingar, frá 1801 og frameftir, teldutøkar, meðan hin er at fáa allar kirkjugarðar teldutøkar.

Í verkætlanin við teldutøkum fólkateljingunum eru nú 40.000 nøvn komin á heimasíðuna at liggja. Hesar eru sum er tøkar hjá limum at leita niður at leita í. Tilsamans eru um 200.000 nøvn í øllum fólkateljingunum frá 1801 fram til 1921. Fólkateljingarnar frá 1801, 1845 og 1850 eru heilt lidnar fyri alt landið. Ætlanin er í ár er at limir fáa møguleika at leita á sjálvari heimasíðuni í øllum innskrivaðum fólkateljingum.

Hin verkætlanin við kirkjugørðunum gongur eisini framá. Nógv tilfar er innkomið og kann takast niður av heimasíðuni og arbeitt verður við at fáa tilfarið skipa soleiðis at betur verður at leita.

WinFamily er nógv mest brúkta ættargranskingarforrit. WinFamily er umsett til føroyskt. Brothers Keeper er eisini nógv brúkt og fæst eisini á føroyskum um stutta tíð.

Við undantak av ársaðalfundinum samskiftur KT Slekt bert um heimasíðu felagsins www.genealogi.fo har eisini ber til á tekna seg sum lim.

# Eivør á pall í Danmark

**Danmarks Radios Bigband og Eivør Pálsdóttir fara á pall í Copenhagen Jazzhouse í næstu viku**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Eivør Pálsdóttir og Danmarks Radios Bigband hava givið fløgu út, sum fær rós. Nú fara tey á pall við útvaldum tónum av fløguni, ið nevnist Trøllabundin.

Mikudagin tann 23. mars og hósdagin tann 24. mars fara tey á pall í Copenhagen Jazzhouse. Báðar konsertirnar eru kl. 20:30.

Politiken hevur rósandi orð at bera samstarvinum millum Eivør og viðurkenda danska bigbandið.

Eivør verður rópt nýggj stjørna á norðurhválvinum. Ummælarin á blaðnum, Erik Jensen, hevur áður givið fløgu hjá Eivør 5 hjørtu og segði tá m.a., at songkvinnan úr Gøtu hevur rødd, karisma og er egin (original) í so stóran mun, at hon kann gerast eitt heimsnavn. Sambært blaðnum kunnu danir gleða seg til at uppliva samstarvið millum Eivær og DR Bigband á palli í næstu viku.

# Opið skip á Veðrinum



Færøernes Kommando boðar í tíðindaskrivi frá, at manningin á Vædderen um vikuskifti fer at hava bjargingarvenjing á vágni í Klaksvík.

Skipið hevur hesa seinastu tíðina havt eftirlit við fiskiskapinum undir Føroyum, og um vikuskiftið verður lagt at bryggju í Klaksvík.

Í hesum sambandi verður ein bjargingarframsýning á vágni, har tyrlan millum annað fer at taka fólk upp av einum gummibáti.

Hetta verður kl. 13.15 leygardagin, og frá 14.00 til 16.00 verður so møguleiki hjá áhugaðum at koma umborð á skipið.

**-jm**

# Gandaheimurin Narnia á føroyskum

ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*




Bókadeild Føroya lærarafelags hevur nú givið út bókina »Narnia 1, systursonur gandakallsins« eftir C.S Lewis. Theodor Hansen hevur týtt bókina, sum Pauline Bayes hevur myndprýtt.

Søgurnar um Narnia verða mettar at vera eitt høvuðsverk í ritverki høvundans, og Bókadeildin fer komandi fýra árini at geva út allar bøkurnar í bókarverkinum. Ætlanin er, at geva tvær bøkur út um árið.

Bøkurnar um Narnia fara fram í einum ævintýrheimi, hagar børnini verða førd, fyri at taka lut í stríðnum um tað góða og tað ónda; tað góða er umboðað av leyvuni Aslan, og tað ónda er umboðað av gívrini Jadis. Hurðin til heimin er ígjøgnum eitt skáp. Narnia hevur sína egnu tíðarrokning og alheim, men landslagið líkist tí, vit kenna. Fyrsta bókin av teimum sjey er um tey bæði Polly og Digory, sum verða tveitt inn í ein annan og sera øðrvísi heim, tá tey ein dagin eru inni í arbeiðsrúminum hjá Andrew morbróðuri. Í hesum heimi verða tey vavd inn í mangar trupulleikar, men tá tey hitta leyvuna Aslan fáa tey greiði á mongum, tey ikki áður hava skilt.

C.S. Lewis, ið var professari í bókmentum og sera gudrøkin, livdi í árunum 1898-1963; umframt bøkurnar um Narnia, ið hann skrivaði í árunum 1949-1956, skrivaði hann hópin av bókum tilk vaksin um bókmentir og heimsspeki.

Frammanundan er »Leyvan, gívurin og klædnaskápið« í føroyskari týðing. Bókin kemur út í nýggjari útgávu seinni í ár.

»Narnia 1 - Systursonur gandakallsins«, sum er vælegnað til tey 10-12 ára gomlu, er 20 bls., innbundin og kostar 180 kr. í bókabúðunum.